

# Jólaborðhald í Eydnuni

***Aftur í ár skipar ungmannafelagið Eydnan fyri jólaborðhaldi har øll eru hjartaliga vælkomin***

*Borðhaldini verða 2. og 9. des. og felags fyri bæði kvøldini er stórt kalt borð við ca. 18 flógvum og køldum rættum, framførslu á pallinum og undir borðhaldinum skipar Fimmbogi Lisberg fyri felagssangi.*

*2. des. spælir Bjørn Djurhuus Band til dans.*
*9. des. spælir Olli til dans.*

*Kostnaður fyri borðhaldi við dansi er kr. 250 aftaná midnátt er almennur dansur, kostnaður fyri dansin er kr. 100*

*Tey ið hava hug at luttaka, verða biðin um at siga frá sum skjótast, vegna avmarkaða atgongd. Seinasta freist at gjalda atgongumerkið er 1 viku undan borðhaldinum.*

***Áhugaði kunnu boða frá luttøku hjá niðanfyristandandi***
***Tlf. 422166 Sólrun Dam***
***Tlf. 442018 Birta Petersen***

Sosialurin - 311820

EYDNAN á Oyrar-bakka



MÁLING
*TILBOÐS-PAKKI:*

**10 ltr. silkiglans veggjamáling**

**+ 10 ltr. matt veggjamáling**

**+ 50m² glasvev**

**+ 2x5 ltr. vevlím**

*ÍALT*
1.159,-

**máling & gólv**
**Við Landavegin**
**Tórshavn • Tel. 31 60 66**



Sosialurin
www.sosialurin.fo


T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Skrivari/málsviðgeri

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivara/málsviðgera til miðfyrisitingina.

**Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:**

- at skriva ymisk skriv, fundarskráir og fundarfrásagnir
- móttøka av fólki á ráðhúsinum
- ymiskar fyrifallandi uppgávur

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovuútbúgving ella aðra relevanta útbúgving. Skal hava kunnleika til, tekstviðgerð og rokniark á brúkarastøði. Skal duga føroykst, danskt og enskt til lítar.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at viðkomandi dugir væl at leggja til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast tilber. Løn sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Tórshavnar kommunu.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við nógvum fjøllbroyttum, útvendum og mennandi uppgávum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, ella Jens M. Poulsen, kommunustjóra, tlf. 31 48 81.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 20. november 2000. Viðmerk á umsóknina "Skrivari/málsviðgeri".

S N A R S K I V A N

**Starv**

# Skrivstovufólk

Hervið verður eitt starv sum skrivstovufólk/málsviðgerði lýst leyst at seta sum skjótast á farmaflutningsdeildini.

**Uppgávurnar hjá farmaflutningsdeildini**
Farmaflutningsdeildin skal veita leiðsluni eina úrslitagóða fyrisiting innan farmaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan farmaflutningin hjá fyritøkuni.
Aðrar uppgávur eru m.a.:

- Samskipa, stýra og hava eftirlit við flutningskervinum
- Skipaavgreiðsla
- Tryggja eitt høgt og støðugt tænastustøði
- Fíggjarligar útgreiningar, herundir prísskipanir
- Hagtalsviðgerð og útgreiningar
- Gera flutningsavtalur
- Útskiftingarætlanir av anleggi og útbúnaði

**Starvið fevnir um**
Høvuðsuppgávur hjá skrivstovufólkinum/málsviðgeranum verða:

- Skrivarauppgávur
- Málsviðgerð, herundir klárgera lønarseðlar og uppgerðir
- Telefon- og kundaavgreiðsla
- Vera við at fyrireika verkætlanir
- Framleiða hagtøl, uppgerðir o.a.
- Vera við at fyrireika útbúgving og fakliga menning av starvsfólkunum á deildini
- Innanhýsis og uttanhýsis samskifti

**Førleikakrøv**
Roknað verður við, at viðkomandi hevur:

- HH, skrivstovuútbúgving e.l.
- Arbeiðir sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap
- Kunnleika og royndir í Microsoft Office forritunum
- Góð evnir at orða seg bæði skrivliga og munnliga

Deildin kann bjóða eitt áhugavert starv, sum kann menna ein bæði fakliga og persónliga.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

*Strandfaraskip Landsins*
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 24. november 2000, kl. 12.00

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Strandfaraskip Landsins, att. Heini á Borg, farmaflutningsleiðari.

Tlf. 34 30 60 ella e-post:hab@ssl.fo.

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*
*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

## Ídna›arstykki til sølu

Uml. 1.300 m² stórt ídna›arstykki vi› ástandandi sethúsum,i› liggur centralt vi› høvu›sveg í Havn til sølu fyri hægsta bo›.

Bo› undir 1.800.000,- hevur ongan áhuga.

Skriva til:
**Sosialin**
Box 76
110 Tórshavn
Bill mrk. 218



# Her er Hanstholm

**Vælmanna› sendinevnd úr Hanstholm vi› borgarstjóranum á odda hevur í vikuni vitja› ymsasta›ni í Føroyum. Tey fóru avsta› aftur vi › Norrønu hóskvøldi›**

SAMSKIFTI
*Edvard Joensen*



*Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur, tekur ímóti Aase Jensen, borgarstjóra í Hanstholm*

*Mynd: Jens K. Vang*

Sambandi› millum Hanstholm og Føroyar eigur at styrkjast, halda limirnir í eini sendinevnd, manna› av vinnulívsólki og politikarum úr Hanstholm, sum hevur vitja› í Føroyum um dagarnar.

Føroyingar, serlig menn sum hava fiska› í Nor›sjónum, og fer›afólk vi› Norrønu, kenna Hanstholm. Men stendur ta› til topparnar í vinnulívinum og b‡rá›num í Hanstholm, skulu enn fleiri føroyingar fáa betri samband vi› b‡in.

Ein grund til, at vælmanna›a sendinevndin úr Hanstholm vitjar í Føroyum beint nú er, at eigaravi›urskifitini hjá donsku havnunum broytast á n‡ggjárinum, sigur Aase Jensen, borgarstjóri í Hanstholm. Eitt nú havnin í Hanstholm hevur veri› statsogn. Men á n‡ggjárinum ver›ur hon løgd út til Viborg Amt og Hanstholm Kommunu, sum tá fara at eiga hvør sína helvt.

N‡ggju havnarvi›urskiftini fara at gera, at økt kapping ver›ur millum havnirnar í Danmark, sigur Aase Jensen. Serliga hugsar hon um havnirnar á jysku vesturstrondini, sum millum a›rar føroyingar brúka. Og vi› hesi kapping fyri eyga hava tey í Hanstholm sett sær fyri at betra um sambandi› vi› Føroyar.

Hanstholm hevur havt hampiliga fitt samskifti vi› føroyingar. Eitt nú teir, sum hava fiska› í Nor›sjónum, hava javnan landa› í Hanstholm. B‡urin liggur høgliga fyri í so máta. Og eitt, sum hevur sermerkt Hanstholm, og sum tey eru sera errin av og vilja halda í hevd, er tann gó›a tænastan, b‡urin ber or› fyri at lata. Ta› hevur veri› eitt hei›ursmál hjá Hanstholm at hava bestu tænastu í Danmark.

Havnin, og ta›, sum vi› hana hevur at gera, er avgjørt størsta aktivi› hjá Hanstholm. Og har ver›ur alla tí›ina bygt út og betra, sigur borgarstjórin. Nú fara tey at gera klárt til at taka í móti n‡ggju Norrønu. Ta›, at hetta stóra skipi› fer at sigla fast upp á Hanstholm ger, at havnin treingir til onkrar ábøtur. Eitt nú størri skráa at leggja til og eisini skal d‡past naka›, sigur Aase Jensen, borgarstjóri í Hanstholm.

Hinvegin er ta› ikki bara Smyril Line, sum hevur ferjurutu til Hanstholm. Eisini norska Fjord Line hevur ferju siglandi millum Vesturlandi› og Hanstholm, umframt at samband eisini er til Newcastle í Englandi.

Umframt borgarstjóran hava fleiri vinnulívsfólk úr Hanstholm veri› á vitjan í Føroyum hesar dagarnar. Tey hava millum anna› vitja› Havsbrún í Fuglafir›i, Fiskavirki› í Gøtu og Fiskamarkna›in á Toftum.

Eisini hava tey hitt ymiska føroyskar politikarar, sum til dømis Jørgen Niclasen, fiskimálará›harra, og Leiv Hansen, b‡rá›sformann í Havn.

Ein teirra, sum var vi› í sendinevndini, er Freddy Nielsen, stjóri á Hanstholm Ny Samlecentral, sum er uppbo›ssøla í Hanstholm.

Hann sigur seg vera hugtiknan av Fiskamarkna›inum á Toftum. Serliga telefonuppbo›ssøluna dámar honum væl.

Ta› er ein sera einføld og løtt skipan at brúka, heldur hann. Hann sigur, at ta› er avgjørt ein skipan, sum verd er at hava eyguni eftir og møguliga royna á donskum uppbo›ssølum.

Ein annar, sum vi› var, var stjórin á Hanstholm Fiskemelsfabrik, Freddy Frost. Hann harmast um, at føroysku ídna›arskipini so at siga eru horvin. Sum er, er bara Zenita eftir, sigur hann, men vónar enn, at onkur fer at royna at sleppa í Nor›sjógvin eftir óbrúktu føroysku kvotuni har.

Freddy Frost sigur, at sí›an gøtuma›urin Atli Hansen flutti aftur til Føroya, hevur líkasum mangla› eitt shippingfelag í Hanstholm. Men ta› ver›ur nú bøtt uppá. Eitt n‡tt felag er stovna›, sum hevur tiki› navni› hjá gamla felagnum hjá Atla Hansen, Nordshipping Hanstholm A/S. Stigtakararnir vóna og vænta, at ta› eisini fer at virka vi› til at seta enn meira lív í havnarumhvørvi› í Hanstholm.

Onkur beinlei›is avtala er eisini gjørd á fer›ini í Føroyum, uppl‡sir Aase Jensen, borgarstjóri í Hanstholm. Til dømis hevur ein prentsmi›ja í Hanstholm, sum umbo›a› var í sendinevndini, fingi› ein ordra úr Føroyum, sum borgarstjórin fegnast um.

Hansthom er ikki nakar stórb‡ur. Í allari Hanstholm Kommunu búgva bara 6.000 fólk. Helvtin b‡r í sjálvum Hanstholm b‡i.

Men kortini er Hanstholm tann størsta fiskivinnuhavnin í Danmark, tá rokna› ver›ur búskaparliga. Og ta› sigur ikki so líti›, at Hanstholm í grundini er ein tann størsta fiskivinnuhavnin í í Europa sum heild. Javnmett vi› Bremerhaven í T‡sklandi og Boulogne í Fraklandi. Hanstholm ver›ur eisini nevnt »Nor›uratlantiska portri›«.


Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin

Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin

**ROYN HENDAN SERA VÆLUMTØKTA BILIN**

**KIA CARNIVAL**
**2.9 Dohc Turbo-Diesel**
**16 V, 126 HK, 5 hurðar**

**Familju - camping - firmabilur- og "mini-bussur"**

**Fæst eisini sum vøruvognur**






***Multibilurin til einhvørja loysn***
Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.

*3 ára garanti/100.000 km. garanti*




**Rætti bilurin til mong endamál. –Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.**

Sosialurin - 311820

D. B. Bilar **J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn Tlf. 310600**